

*- Eg helt meg vera ein góðan trúgvandi persón. Men í fangaskapi okkara hjá hesum muslimska uppreistrarbólkinum í jungluni, tá fekk eg veruliga eyguni upp fyri hvør eg var – og hvussu eg var, greiðir Gracia frá*

Men eg kom í roynd og veru at hata hesar muslimarnar, sum høvdu tikið okkum sum fangar.

– Eg hataði teir fyri tað, teir gjørdu móti mær og ikki minst fyri tær líðingarnar og pínuna, sum teir løgdu á familju mína.

Í fangaskapinum komu tey at liva undir vesalum umstøðum, og hetta hevði eisini ávirkan á andaliga lív hennara.

– Eg sá, at hermenninir høvdu bæði mat og annað í yvirflóð, meðan vit sótu í hungri og tosta.

– Eg gjørdist øvundsjúk inn á teir, og gjørdist somuleiðis havisjúk: Eg vildi bara hava tað sama sum teir, tí vit vóru so svong og illa fyri.

## Líðing og pína

Hatrið og øvundsjúkan vóru kortini ikki einastu negativu síðurnar av sálarlívi hennara sum komu undan kavi hesa tíðina.

Verri fyri hana var helst tað, at hon gjørdist trúleys – trúgvin uppá tann Gud, sum hevði sent tey hesa longu leiðina, byrjaði at hvørva.

– Eg spurdi Gud fleiri ferðir, hví júst eg skuldi uppliva slíka líðing? Eg skilti ikki meiningina við tí, nú eg hevði sitið fangi í slakar níggju mánaðir og ikki visti, um eg varð leyslatin ella um hon slapp livandi frá hesum.

– Ja, eg mátti snøgt sagt bara spyrja Gud, um hann hevði tað fínt við at eitt av hansara børnum var stødd í slíkari líðing?, sigur Gracia.

Tað var tá, nú hon var komin so langt, at hon hinvegin merkti at hon var hildin føst í Guds hond og at Guds umsorgan fyri henni ikki var minni nú enn áður.

– Tað gleðiliga var, at nú eg byrjaði at grenja mótvegis Gudi, tá byrjaði Hann í roynd og veru at arbeiða í mær.

– Hetta kendist trygt og gott at uppliva: Hann hevði altso ikki gloymt meg!

## Gávur at brúka

Gracia og Martin tosaðu nógv saman um støðuna og framtíð teirra. Hetta var ikki altíð so einfalt, tí stjórnarherurin var alla tíðina í hølunum á teimum. Heilar 17 ferðir kom tað til skotbardagar millum partarnar.

Undir hesum samtalum spurdi hon ein dagin mann sín um, hvar friðurin, gleðin, nøgdsemið hjá henni vóru farin. Áttu uppreistrarmenninir ikki at sæð meiri til hesar partar av kristna lívinum?

– Eg spurdi Martin beinleiðis: Hvar er alt hetta góða hjá mær farið? Var kærleikin til míni medmenniskju horvin, meðan hatrið ístaðin var komið inn?!

Svarið hon fekk frá manninum var so fult av vísdómi og kærleika, at eygu hennara lótust upp fyri hesum gudgivnu gávunum.

– Martin segði: Hetta eru alt gávur sum tú ikki á nakran hátt kanst píska upp í tær sjálvari. Hetta eru alt gávur, sum tú hevur fingið frá Heilaga andanum.

– Bið Gud um skapa hesar gávurnar av nýggjum í tær. Tað gjørdi eg so, og fann veruliga fram til tær aftur.

– Og síðani fingu vit loyvi til at vera til tænastu fyri hesar muslimsku uppreistrarmenninar, sum høvdu tikið okkum sum fangar, greiðir hon víðari frá. – Vit ynsktu nú at vera opin fyri, hvussu vit kundu tæna teimum.

## Hjálp í rættari tíð

Tey fingu serstakan kærleika mótvegis tí eina manninum. Einum manni tey ikki kendu navnið á, men sum tey kortini elskaðu við Guds kærleika. Mannin sum fekk navnið "Nr. 57" (sí serstaka frásøgn).

– Soleiðis kundi Gud umbroyta okkara lív – frá hatri til kærleika, sum aftur gav seg til úttrykk í umsorgan fyri einum manni, sum hevði tikið okkum til fanga, sigur hon.

Tað størsta var kortini tað, at nøgdsemið og gleðin komu undan kavi aftur í lívinum hjá Graciu. Hon lærdi nú týdningin at takka Gudi fyri tað góða heldur enn tí ringa.

Eitt bíbliuørindi kom serstakliga til hana hesa tíðina – orðini úr Hebrearabrævinum kap. 4 og ørindi 16: "Latið okkum tí við dirvi stíga fram fyri hásæti náðinnar, so vit kunnu fáa miskunn og finna náði til hjálp á rættari tíð!"

– Gud er her hjá hvørjum einstøkum okkara. Hann vil hjálpa tær í tínum tørvi, eins væl og hann gjørdi tað í okkara lívi.

– Hevur tú tí tung ting at stríðast við, legg tað fram fyri Hann. Hann vil hjálpa tær í rættari tíð, endaði Gracia boðskap sín.

> *" – Tað gleðiliga var, at nú eg byrjaði at grenja mótvegis Gudi, tá byrjaði Hann í roynd og veru at arbeiða í mær. Hetta kendist trygt og gott at uppliva: Hann hevði altso ikki gloymt meg!*



*Gracia og Martin áttu trý børn. Hesi vóru ikki við tann minniliga dagin á vári 2001. Men í Føroyum vóru tvey teirra við. Her prátar hon við dóttrina*



*Gracia Burnham hevur vitjað í Føroyum og greitt frá lívi sínum. Hon býr í dag í Kansas í USA har hon virkar sum umboð fyri missiónsfelagsskapin New Tribes Mission*

# Nr. 57 fekk hjálp

Tann eini uppreistrarmaðurin fekk navnið Nr. 57 var meiri at kalla av tilvild. Hann bar nevniliga altíð eitt tungt M 57-vápn. Av hesum fekk hann navn sítt.

Tey løgdu merki til at hýrur hansara altíð var so ringur. Hann var í roynd og veru altíð í ringum hýri, og gníggjaði sær í heilum um tinningin.

Ein dagin komu uppreistrarmenninir í skotbardaga við stjórnarherin og vórðu noyddir at flýggja undan í skundi. Fleiri mans vórðu særdir í hesum bardaganum.

Av einihvørjari orsøk eydnaðist tað Maritni og Gracia at fáa hendur á eini medisinkistu, og hagani fingu tey tikið ymiskan heilivág móti pínu og infeksjónum. Hetta tóku te við í avmarkaða viðførið sítt, samstundis sum tey runnu fyri lívinum.

Í allari hesi rokanini komu tey at hugsa um Nr. 57 og rosøkina til ringa hýr hansara: Kundi orsøkin til hetta vera hin einfalda at maðurin hevði støðuga høvuðpínu?

Hóast hann var muslimskur uppreistrarmaður og kundi til eina og hvørja tíð gera av við tey bæði, vístu tey kærleika mótvegis honum og góvu nakað av pínustillandi heilivági.

– Hann takkaði fyri, og tað tóktist sum hvarv pínan beinanvegin. Tað besta við øllum var kortini tað, at Nr. 57 broyttist fullkomuliga. Hann gjørdist nú meiri smílandi og heilsaði okkum við síni serstøku muslimsku heilsan. Jú, hann var vorðin eitt annað menniskja.